# 20-ára gamla Elin koppaði tveimum borgarstjórum

**Elin Vatnhamar Olsen er nýggj í kommunalpolitikki, og hon kom inn í Eysturkommununa við einum braki, tá hon koppaði tveimum fyrrverandi borgarstjórum**



*Elin Vatnhamar Olsen koppaði bæði Páll Isholm og Dánjal Andreasen, tveimum fyrrverandi borgarstjórum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

KOMMUNALVAL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað krevur dirvi at bjóða seg fram í kommunalpolitikki, serliga tá tað er millum garvaðar kommunalpolitikkarar, sum enntá hava sitið sum borgarstjórar.

Men tað dirvi átti 20 ára gamla Elin Vatnhamar Olsen, tá hon stillaði upp á listanum hjá Tjóðveldi í Eysturkommunu.

- Fyrstu ferð at onkur nevndi tað fyri mær, helt eg, at viðkomandi skemtaði. Men hesin vissaði meg um, at tala var um álvara, sigur Elin Vatnhamar Olsen.

So hon byrjaði at hugsa um tað, og yvir eitt vikuskifti tók hon avgerð um at royna seg í kommunalpolitikki.

- Eg havi fingið ógvuliga nógva hjálp frá familjuni og vinunum. Eg havi nokk so stóra familju, og tað hjálpir, og annars havi eg tosa við fólk, serliga tey ungu, sigur Elin Vatnhamar Olsen.

Hinvegin hevur hon ikki gjørt so nógva við traditionella valstríðið við at skriva greinar í bløðum, tó at onkur í familjuni hevði hongt nakrar plakatir upp kvøldið fyri valið.

### Spent upp á framtíðina

Valkvøldið, tá liðugt var at telja upp, vóru vónirnar ikki serliga góðar.

- Tá eg kom í valhølið hoyrdi eg, at ein, ið eg kappaðist við, hevði einar 73 atkvøður, meðan eg hevði fingið 40. Samstundis hevði Páll Isholm fingið 45 atkvøður. Men so hendi tað, at eg hevði fingið seks atkvøður í Gøtu og kom upp á 46 tilsamans, sigur Elin Vatnhamar Olsen.

Fínteljingin í dag staðfesti úrslitið, og tískil er Elin Vatnhamar Olsen vald á ytsta mandati.

Og hon gleðir seg til avbjóðingina.

- Fyrst og fremst fari eg at seta meg inn í ymsu málsøkini, og tað síggi eg fram ímóti við spenningi. Og ein hin fremsta uppgávan verður at samansjóða báðar bygdirnar, sigur Elin Vatnhamar Olsen.

Hon vil ikki lova her og nú at arbeiða fyri nøkrum ávísum máli, men fyrst at seta seg inn í kommunuarbeiðið.

- Eg vil takka øllum teimum, sum góvu mær áræði at stilla upp, og øllum teimum, sum valdu meg til valið. Eg fari at gera mítt besta til at liva upp til hesa ábyrgd, sigur Elin Vatnhamar Olsen, helst ein av yngstu kommunuráðslimum nakrantíð.

# Heðin vann valið

**Jan Christiansen er rættiliga bersøgin dagin eftir valið. – Eg haldi ikki, vit kundu gjørt nakað øðrvísið. Her var talan um, at Heðin Mortensen vann valið, so einfalt er tað, sigur Jan Christiansen**



*Tað er trupult at verja seg móti ein um metsigri sum tí, Heðin Mortensen vann við kommunuvalið í gjár, heldur Jan Christiansen*

KOMMUNUVAL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í morgun vaknaðu kommunu politikarar upp til beiska veruleikan. Fyri summi er hann kortini ógvuliga søtur.

Minni so var hann fyri Fólkaflokkin og Jan Christiansen. Flokkurin gekk ein lim aftur, og spísskandidaturin varð yvirháłaður av Sjúrði Olsen. So hvat kundi verið gjørt øðrvísið.

- Eg veit ikki rættiliga. Fólkið hevur í hvussu er talað, og borgarstjórin er eftir øllum at døma so væl umtóktur, at hann hevur brotið øll met, sigur Jan Christiansen.

Hann sigur, at onkur má missa, tá Javnaðarflokkurin gongur so nógv fram og vísir á, at Sambandsflokkurin misti tveir býráðslimir.

- Vit skulu eisini minnast til, at vit longu undan valinum høvdu mist einar 500 atkvøður við tað, at hvørki Annika Olsen ella Bjarti Morh stillaðu upp aftur, sigur Jan Christiansen.

Tað hevur sambært úrslitinum av valinum víst, at tað ikki til fulnar hevur eydnast, at fylla tað tómrúmið út til lítar. Eisini vísir Jan Christiansen á, at valluttøkan er heldur minni enn við valið seinast, og tað kann hava havt týdning.

### Væntaði ættarliðsskifti

Hann heldur samstundis, at føroyskur politikkur er undarligur.

- Her hava vit ein politikara, sum eftir seinasta val loypur frá einari undirskrivaðari avtalu, men slíkt avtalubrot verður eftir øllum at døma ikki revsað í Føroyum. Men hetta avtalubrotið hevur kostað teimum, sum hava sitið saman við Heðini. Tey, sum ikki ruku út úr býráðnum, skrambláðu niður í atkvøðutali, sigur Jan Christiansen.

Hann dugir ikki at siga, hvat flokkurin kundi gjørt øðrvísi í valstríðnum. Hann heldur, at valevnini hava havt javnt gott val, men tað hevur so ikki verið góð mikið til at hildið tørn.

- Tað var ikki lætt hjá okkum at gera nakað eftir valið heldur. Heðin Mortensen dróg Tjóðveldi inn á fund beinanvegin, og har sótu tey, til ein samstarvsavtala var undirskrivað. So vit fingu ongan møguleika, sigur Jan Christiansen.

Persónliga hevði Jan Christiansen heldur ikki so gott eitt val sum seinast, og Sjúrður Olsen tók seg fram um hann í atkvøðutali.

- Men tað lá longu í luftini framman undan valinum, so tað kom ikki óvart á. Hann er jú yngri, so talan er um eitt ættarliðsskifti, og tað er í lagi við mær, sigur Jan Christiansen.

### Ynskir tillukku

Hann heldur ikki, at flokkurin kundi vart seg móti tí, sum hendi á valinum.

- Vit mistu ein býráðslim, Tjóðveldi helt so dánt stand, meðan Sambandið misti tveir. Men her var ikki talan um ein politiskan sigur til Javnaðarflokkin. Her var talan um ein persónligan sigur til Heðin Mortensen, sigur Jan Christiansen.

Hann heldur, at tað verður tungt og keðiligt at skula sita í andstøðu fýra ár aftrat, men soleiðis eru treytirnar nú einaferð. Og flokkurin fekk sum nevnt ikki møguleikan at koma í samgongu.

- Tað var væntað, at Heðin Mortensen fór at fáa eitt gott val, men at tað skuldi gerast so gott, kom óvart á øll, eisini Heðin Mortensen sjálvan, sigur Jan Christiansen.

Hann fegnast kortini um, at so nógv hóast alt stóðu saman um flokkin.

- Eg vil fegin takka teimum, sum stóðu saman um flokkin og vardu garð. Samstundis fari eg at ynskja Heðin Mortensen tillukku við valinum, har hann hevur brotið øll met, sigur Jan Christiansen.

---

eisini talan um fleiri nýggjar persónar.

- Eg fari at halda meg til tey mál, sum vit samráðast um. Eg eri framvegis tann sami Heðin Mortensen, sum eg altíð havi verið, men vit hava sum nevnt nýggj fólk, ikki minst ein nýggjan varaborgarstjóra. Og øll skulu hava síni fingramerki á nýggja samgonguskjalið, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at talan verður um eina spennandi tíð við nýhugsan og broytingum.

- Vit hava styrkt um umsitingina í 2008 og 2009, og tá verður hon so sterk sum neyðugt. Men øll starvsfólk skulu kenna seg trygg í sínum starvi, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at kósin er sett, og at hana fara teir at halda, men at justeringar sjálvandi kunnu koma fyri, nú talan er um so nógv nýggj andlit.

Tað hevur ofta verið skotið borgarstjóranum í skógvarnar, at hann leyp frá einari avtalu eftir seinasta val. Men hesum vísir hann aftur.

- Soleiðis síggi eg als ikki upp á tað. Og eg eri enn sannførdur um, at eg gjørdi tað rætta fyri fýra árum síðani. Og tað haldi eg eisini, at valúrslitið týðiliga vísir, sigur Heðin Mortensen, sum altso fer at sita í borgarstjórasessinum fýra ár aftrat.

## BÝRÁÐIÐ

**Borgarstjóri**: Heðin Mortensen
**Varaborgarstjóri**: Bogi Andreasen
**Fíggjarnevndin**: Javnaðarflokkurin
**Mentanarnevndin**: Tjóðveldi
**Byggi- og býarskipanarnevndin**: Tjóðveldi
**Heilsu- og umhvørvisnevndin**: Javnaðarflokkurin
**Tekniska nevnd**: Tjóðveldi
**Sosiala nevnd**: Javnaðarflokkurin
**Havnanevndin**: Tjóðveldi